Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið

## Avloysari sum skrivari

Søkt verður eftir barnsburðaravloysara sum skrivari á Lógardeildini at setast skjótast til ber og fram til 1. oktober 2002.

**Arbeiðsuppgávur**

Skrivarin røkir m.a. hesar uppgávur:
? heldur skil á málum
? fyrireikar mál
? skrivar brøv
? setir upp rundskriv, kunningarskriv, vegleiðingar o.a.
? rættlesur og umsetir t.d. brøv, viðmerkingar til lógir o.a.

**Førleikakrøv**

Vit vænta okkum, at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
? duga væl at málbera seg á føroyskum
? setir seg skjótt inn í ymisk viðurskifti
? sjálvstøðugan arbeiðshátt og kann raðfesta arbeiðið
? góð samstarvsevni
? dugir at nýta Microsoft Word og Outlook – hetta er ein fyrimunur ikki eitt krav
? royndir sum skrivari er ein fyrimunur

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður lønt í 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Anju Hovgaard, deildarstjóra, á tlf. 35 26 00.

**Umsóknir**

Umsóknir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin, 20. mars 2002.

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Traðagøta 39
Postboks 2151
FO-165 Argir

---

LØGMANSSKRIVSTOVAN

## Skrivstovufólk

Starv sum skrivstovufólk á Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja til setan 1. apríl 2002 ella skjótast gjørligt. Talan er um fast starv. Eisini er talan um at seta ein avloysara í eitt ár í 1/2 tíð.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um arbeiði í skjalasavninum (journalini). Talan er um skráseting av posti og ymiskt journal-/arkivarbeiði. Starvið fevnir eisini um at hjálpa til við øðrum uppgávum í Løgmansskrivstovuni.

**Yrkislig førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Serligur dentur verður lagdur á royndir við journalarbeiði, kunnleika til DocuLive skipanina og teldukunnleika á brúkarastøði.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og haraftrat vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Dentur verður lagdur á røkinskap.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er í fyrsta lagi skjalasavnið á Løgmansskrivstovuni. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sofus Borðoy, journalleiðara ella Petur Simonsen, umsitingarleiðara.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
Tinganesi
FO-100 Tórshavn

Telefon 351010, Telefaks 351015
Teldupostur info@tinganes.fo

og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 21. mars 2002.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

---

GRINDAMANNAFELAGID
1993 1984

## Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin tann 6. apríl 2002 klokkan 14.00 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av einum nevndarlimi
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært pkt. 6, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er almennur.

Høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir.

**Nevndin fyri »Grindamannafelagið«**
Fútalág 40 • 100 Tórshavn

---

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

---

## Aðalfundur

**Føroya Lærarafelags
og árligi limafundur hjá
Stuðulsgrunni Lima Føroya Lærarafelags**

verða

leygardagin 20. apríl 2002 kl. 10.00
á Føroya Læraraskúla

Fundur sambært viðtøkum felagsins.

Innkomin mál skulu skrivliga vera komin til nevndina í seinasta lagi mikudagin 27. mars 2002 á middegi.

**Føroya Lærarafelag**

---

Norðoya Tjóðveldisfelag

Aðalfundur verður hóskvøldið 14. mars klokkan 20.00 í Bøgøtu 3.
Skrá sambært lóg, og møguligar broytingar í viðtøkunum.

**Nevndin**

---

Í BÝIN
HVØNN HÓSDAG

---



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Starvsfólk til heimavitjanartænastuna

Fyri at betra um trivnaðin og tryggleikan í gerandisdegnum hjá eldru borgarunum í kommununi, hevur Tórshavnar kommuna samtykt at seta heimavitjanartænastu á stovn.

**Endamálið við tænastuni er m.a:**
- at vitja regluliga í heiminum hjá teimum gomlu
- at práta um gerandisdagin
- at veita heilsuvegleiðing um trivna og menning
- at kunna um mongu og fjølbroyttu tilboðini og tiltøkini í kommununi
- at fáa tey gomlu at vera virkin í frítíðini
- at gerandisdagurin kann fáa størri lívsinnihald

Starvið umfatar eisini at samskipa visitatiónina til ellisheims-, røktarheims- og sambýlisplássini í kommununi.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at virka í tøttum samstarvi við kommunulæknarnar og heimarøktina.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjarin:
- er útbúgvin sjúkrasystir ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur royndir frá arbeiði við gomlum fólki
- er fyrikomandi og álitisvekjandi
- hevur umsitingarligar royndir

**Starvs- og setanarviðurskifti**
eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður skipað undir trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2002.

SNARSKIVAN

---

## Bilførari/Avgreiðslufólk
### til Timburhandilin á Kambsdali

Vit sóknast eftir einum bilførara við vanligum koyrikorti og eftir einum avgreiðslufólki til
goymsluna at byrja sum skjótast.

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan handil
við byggitilfari.

Starvið sum bilførari fevnir um útkoyring av byggitilfari umframt avgreiðsluarbeiði.
Starvið sum avgreiðslufólk fevnir um dagliga avgreiðslu av byggitilfari v.m.
Fyri bæði størvini gevur truckloyvi fyrimun, men er ikki ein treyt.

Vit vænta, at tú:
– er nærlagd/ur og røkin
– vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og kanst livað upp til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn.

Umsóknin skal sendast til:

**P/F Havnar Timburhandil**
**Postsmoga 3038**
**110 Tórshavn**
**Att.: Jógvan Jørgensen**

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen á tlf. 311250

**Timburhandilin á Kambsdali**

HT TILFAR
Byggekram

---

## Skeið í resirkulering

Mikudagin 13. mars verður skeið í resirkulering á Hotel Norð á Viðareiði.

Skeiðið er ætlað starvsfólkum á smoltstøðum og øðrum við áhuga fyri smoltaling.

Undirvíst verður m.a. í vatngóðsku, vatnreinsing, rakstur á smoltstøð, sóttreinsing og biofiltrum.

Frálæran gevur góða vitan um arbeiðslagið hjá biobakterium, hvat kann órógva biologisku gongdina og hvussu trupulleikar við biofiltrum kunna loysast.

Skeiðið er frá kl. 9[00] til 16[30].

Kostnaður v/MVG kr. 1.500,– í roknað døgurða o.a.

Tekning á tlf. 212510 ella faks 457814, áðrenn 8. mars.

**Sylvin Rasmussen**

---

## Hús til leigu

Húsini eru í 3 hæddum, kjallara- miðhædd 102 fermetrar hvør og loft uml. 80 fermetrar, alt innrættað.

Á loftinum eru køkur, stór stova/alrúm, kamar og bað, wc. Í miðhæddini eru køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og altan. Í kjallarahæddini eru íbúð við køk, stovu, 3 kømur, klædnarúm, baðirúm, vaskifýrrúm og gongd.

Betongdekk er ímillum kjallara og miðhædd. Húsini hava teldukervi og parabolskipan og vekslara. Húsini standa í friðaligum, barnavinarligum umhvørvi, stutt frá skúla og handli. Sera gott útsýni. Vælegna til eitt hvørt vinnuligt endamál.

**Tlf. 210702 millum kl. 17 – 20**

## Handilsbygningur til leigu

Bygningurin er í trimum hæddum, hvør hæddin er uppá uml. 100 fermetrar og liggur sera væl fyri við R. C. Effersøesgøtu har Akvariumbúðin er.

Leigumálið kann byrja 1. apríl.

**Tlf. 210702 millum kl. 17 – 20**

---

Suðuroyingar!
Nýtt skeið



Buss Lastbil Trailara

byrjar í Suðuroynni
mánakv. 11. mars - kl. 20.30

Avmarkað næmingatal!

team85

nærri fæst at vita:
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82 • Tel 318821 • 315298 • Fartel 218777 • hajah@post.olivant.fo
Telefonin svarar frá kl. 15.00 - 16.30

---

DYNAPAC
-maskinurnar sum halda!



- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum til betong/stoyping
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir

Keyp góðsku – keyp Dynapac!

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820